Andstøðan:

# Samgongan handlar yvir høvdið á tinginum

**Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin eru í øðini um viðgerðina hjá samgonguni í sambandi við bygging av nýggjum Tekniskum skúla**

POLITIKKUR
*Heri á Rógvi*

Í einum tíðindaskrivi átala umboð fyri andstøðuflokkarnar í Mentanarnevnd Løgtingsins harðliga viðgerðini av løgtingslógaruppskotið um Tekniska skúla og Handilsskúlan í Havn.

Tað er fatanin hjá Heðini Mortensen úr Sambandsflokkinum og Katrin D. Jakobsen og Andreasi Petersen úr Javnaðarflokkinum, at samgongan súltar lógaruppskotið í mentanarnevndini. Tey meta, at málið er klárt til 2. viðgerð, tá álit er skrivað og atkvøtt er í tinginum, men framvegis verður málið hildið í nevnd.

– Vit átala hesi grovu vanvirðing fyri tinginum, at tingskipanin ikki veðrur hildin orsaka av innanhýsis klandri um málið og samgonguflokkarnir ikki tora at vísa sína støðu í málinum, siga tey trý andstøðuumboðini í tíðindaskrivi.

Tey halda eisini upp á, at samgongan hevur gjørt ein rossahandil og eina neyðavtalu, uttan at tað liggur nakar yvirorðnaður politikkur aftanfyri.

Ætlanin, ið andstøðuumboðini vísa til, er ein skúlabyggingarætlan, dagfest 16. apríl og undirskrivað av Høgna Hoydal, landsstýrismanni, eftir fund við umboð fyri samgonguflokkarnar.

Í stuttum kunnu vit siga, at ætlanin gongur út upp á, at farast skal undir at byggja skúladepilin í Marknagili í 2004, og tey fyrstu hølini kunnu takast í nýtslu í 2005/2006.

Tað eydnaðist okkum ikki at fáa eina viðmerking frá Høgna Hoydal, landsstýrismanni.



*Mynd: Anstøðan heldur, at samgongan vanvirðir Løgtingið við viðgerðina um Tekniskan skúla og skúladepil í Marknagili*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Hava kortlagt djóra og plantulív við Føroyar

Tað eru tungvektarar og fólk við nógvari vitan og royndum, sum í hesum døgum fylla skeið og fyrilestrsarhølini á Hotel Hafnia. Ikki færri enn 30 granskarar og vísindafólk eru samankomin at tosa um úrslitini av mongu BIOFAR-kanningunum tey seinastu árini. Her verður tosað um djór og plantur og um Norðuratlantshavið og almenn lívfrøðilig viðurskifti, sum har eru ráðandi. Tað var Eyðun Elttør, landsstýrismaður í umhvørvismálum, sum setti stevnuna. Hópurin av fyrilestrum er á skránni á stevnuni, sum heldur fram leygardagin. Tað var granskarin O. S. Tendal sum legði út við eini áhugaverdari frágreiðing um úrslitini av BIOFAR granskingini sum heild. Síðani hava grankarar úr fleiri londum hildið fyrilestrar eisini. Tað er Arne Nørrevang, doktari sum fyriskipar ráðstevnuna saman við Jan Sørensen, stjóra í Kaldbak. Lesið meira um ráðstevnuna í næstu viku.





*Frá ráðstevnuni á Hotel Hafnia*

*Myndir Jens K. Vang*


**MYNDATÓL TIL SØLU**
1 1/2 ára gamal Minolta Dynax 500si kassi til sølu fyri 1.800 kr. 1 ára gamalt Minolta 3500 xi blitz til sølu fyri 1.500 kr. 1 ára gomul Tamron 28-300 mm. aspherisk linsa. til sølu fyri 5.000 kr. Samlað til sølu fyri einans 7.500 kr., nýprísur 13.000 kr.
*Tlf. 260590*

**TIL SØLU**
Gamo Hunter 220 luftbyrsa 5,5 mm til sølu fyri 1800,-. 18 ára aldursmark.
*Tlf. 222615*

**NOKIA**
4 mðr. gomul Nokia 3410 fartelefon til sølu fyri einans 1.000 kr.
*Tlf. 259173*

**TIL SØLU**
1 stk. ruskílat til sølu.
*Tlf. 314575*

**NOKIA 3330**
til sølu fyri 900,-
*Tlf. 224944 ella 312077*

**XP VATNSKUTARI**
130 HK, nýggjur motorur, siglt 32 tímar. Vognur, 4 dragtik, vatnski, púta fylgir við. Prísin kunnu vit tosa um.
*Tlf. 226880*

**SÚRHOYGGJ**
til sølu, umleið 3,5 kbm.
*Tlf. 441446 ella 260338*

**MÁLNINGUR TIL SØLU**
Um hóskandi boð fæst, er ein málningur ið Frimod Joensen hevur málað til sølu – par í mánalýsi.
*Tlf. 504113*

**RADIATORUR**
Óbrúktur einkultur radiatorur til sølu. Stødd: 180x65cm. Til sølu fyri kr. 200,-
*Tlf. 229346*

**VINDEYGA YNSKIST**
Vindeygað ynskist bíliga til keyps, nýtt ella lítið brúkt. Breidd: ca. 70 - 100 cm. Hædd: ca. 100 - 120 cm. - Ring
*Tlf. 457830 ella 757830*

**TRENINGSBONKUR**
Nýggjur TV-shop treningsbonkur »Total-Gym 1000« »Chuck Norris« til sølu.
*Tlf. 264577*

**YNSKIST**
Vindeygað ynskist bíliga til keyps, nýtt ella lítið brúkt. Breidd: uml. 70-100 cm. Hædd: uml. 100-120 cm.
*Tlf. 457830 ella 757830*


# Bilasølustevna og undirhald á Giljanesi

TÍÐINDASKRIV

Leygardagin 3. mai og sunnudagin 4. mai, frá kl. 14.00-20.00, verður bilaframsýning í ítróttarhøllini á Giljanesi, har umframt bilarnar eisini verða ymisk onnur tiltøk á skránni. Ítróttarfelagið FS Vágar skipar fyri tiltøkunum

Leygardagin 3. mai kl. 14.00 letur ein bilasølustevna upp í Ítróttarhøllini á Giljanesi. Klokkan 15 verða Føroya MC Boogie við umleið 60 motorsúkklum uttanfyri høllina og kl. 16.00 setur leiðarin fyri Felagið Vágar, Terji Nielsen, stevnuna. Kl. 19.00 verður sambadansur.

Stevnan letur aftur kl. 20.00

Sunnudagin 4. mai er opið frá kl. 14.00-20.00. Kl. 16.00 verður mat- og køkutombola, kl. 17.00 verður mótaframsýning, har klædnahandlar í Vágum sýna fram. Frá kl.18.00-20.00 verður møguleiki at royna um lykilin passar til ein skutara, ið verður burturlutaður. Framsýnarnir á stevnuni vera VR Bilar, Berg Motors, Norðbil, Wenzel, DB Bilar og Eyðbjørn Hansen.

Ítróttarfelagið FS Vágar skipar fyri tiltøkunum. Mat- og kaffisøla verður báðar dagarnar.



## HEILSANIR



Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum á ymiskan hátt vóru við til at gera hjúnabandsdag okkara tann 21. sept. 2002 ógloymandi.
**Fríða og Jógvan Højbro**



**Góða Poula**
Hjartaliga tillukku við 8 ára føðingardegnum í morgin.
**Heilsan omma**



**Góði elskaði Markus**
Hjartaliga tillukku við 5 ára degnum 27. apr.
**Ynskja mamma, babba, Andrias, Dánjal og Jónas**



**Góða Heidi**
Hjartaliga tillukku við 18 ára føðingardegnum tann 26. apr. Alt tað besta ynski eg tær.
**Heilsan Ása**



**Góðu Hanna og Elsa**
Hjartaliga tillukku við 17 ára døgunum tann 19. og 29. apr. Nú mugu tit skikka tykkum so væl. Tit eru ikki 18 enn. Harrans singing.
**Heilsan Ásla, Súsanna, Jóna og Hanna C**



**Góða fitta Guðrun**
Hjartaliga tillukku við 11 ára føðingardegnum og alt tað besta í framtíðini.
**Ynskja Turið, Rakul, mamma og babba**



**Góða elskaða Tordis**
Hjartaliga tillukku við 6 ára føðingardegnum 27. apr. Jesus pápi signi framtíð tína.
**Ynskja omma og abbi í Havn**



**Góða omma**
Hjartaliga tillukku við 60 ára degnum. Takk fyri alt tú ert fyri okkum.
**Heilsan vit á Argjum**




**Hey øll!**
Kenna tit meg - eg byrji við J og endi við ákup Martin. Eg eri at hitta í klubbagarðinum í kvøld. Muss muss.




**Góði Jákup Martin**
Hjartalig tillukku við 20 ára føðingardegnum. Takk fyri seinast.
**Heilsan Marner**



**Til silvurbrúðarparið Karin og Thomas Juul**
Hjartaliga tillukku við silvurbrúðleypsdegnum 23. apr. Vit gleða okkum at síggja tykkum leygarkvøldið. Alt tað besta.
**Bestu heilsanir Kristianna, Elly og Maiken**



Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum á ymsan hátt vóru við til at gera hjúnabandsdag okkara 20. juli 2002 ógloymandi. Jesus signi tykkum.
**Kristina og Jógvan Martin Hansen**



**Góða mostirgumman**
Hjartaliga tillukku við 19 ára degnum í dag. Jesus pápi signi framtíð tína.
**Heilsan Gurðið og Albert**
**PS.** Okur longjast


## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:........................................................................
........................................................................................
........................................................................................
........................................................................................
........................................................................................
........................................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ..........................................................................
Bústaður: ....................................................................
Bygd/býur: .................................... Tlf.: .................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«